UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Fylgiskjal 5

Innanhýsis
Tórshavn, tann 27. mars 2023
J.Nr.: 23/01048
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RNA

Hoyringarnotat um uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu (Lóg um tøkugjald)

Uttanríkis- og vinnumálaráðið sendi tann 8. mars 2023 uppskotið til hoyringar hjá viðkomandi myndugleikum og feløgum. Hoyringarfreistin var tann 19. mars 2023.

Hesir myndugleikar og feløg fingu uppskotið til hoyringar:
Havbúnaðarfelagið, Landsbankin, Kommunufelagið, Fíggjarmálaráðið og Granskingarráðið.

Uppskotið hevur eisini ligið frammi til hoyringar á heimasíðu Uttanríkis- og vinnumálaráðsins og á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum.

Hesir myndugleikar og feløg hava sent inn viðmerkingar til uppskotið:

- Kommunufelagið,
- Landsbankin og
- Havbúnaðarfelagið.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til hoyringarsvarini:

Kommunufelagið
Í hoyringarsvarinum frá Kommunufelagnum verður víst á, at ætlaðu broytingarnar í uppskotinum hava beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Samstundis verður fegnast um, at nýggja landsstýrið ætlar at lata kommununum ein part av tøkugjaldinum. Mælt verður tó til at gera eina greiðari og einfaldari loysn, har bæði uppskotini, broytingarnar í tøkugjaldinum og veiðigjøldunum verða broytt soleiðis, at kommunurnar altíð verða fíggjarliga skaðaleysar av veiðigjøldunum.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Uttanríkis- og vinnumálaráðið ásannar, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Hetta er eisini ein av orsøkunum til, at í uppskotinum verður ásett, at kommunurnar fáa part av tøkugjaldinum. Tó er í uppskotinum lagt upp fyri einum munandi hægri gjaldi til kommunurnar, enn tær beinleiðis fíggjarligu avleiðingarnar, sum uppskotið hevur fyri kommunurnar.

Grundgevingin fyri hesum er, at landsstýrið hevur sett sær sum mál, at gjøldini frá teimum vinnum, ið hava framíhjárætt at troyta eitt avmarkað og felags náttúrutilfeingi, eiga í størri mun at fíggja felags vælferðartænastur og at lækka skattabyrðuna hjá vanligum løntakarum – eins og at betra um haldførið í búskapinum og arbeiðs-, vinnu- og livikorini kring landið.
Landsstýrið hevur boðað frá, og havt fundir við Kommunufelagið um ætlanirnar at fremja eitt lønarlyft fyri størv innan vælferðar- og umsorganarstørvini og at stytta arbeiðsvikuna. Ein stórur og týðandi partur av vælferðartænastunum eru lagdar til kommunurnar at umsita, og harvið eisini starvs- og lønarviðurskifti hjá teimum, ið starvast í eldrarøkt, á dagstovnum og í øðrum tænastum fyri borgararnar.

Tí er landsstýrið samt um, eftir at hava viðgjørt hoyringarsvarini, at 2% av tøkugjaldinum og 2% av veiðigjøldunum skulu falla til kommunurnar.

Býtið verður ásett við støði í eini útrokning av lækkingini í inntøkuni frá partafelagsskatti í teimum kommunum, sum fáa lægri partafelagsskatt vegna broyting í gjøldum í hesum lógaruppskoti. Meginreglurnar í kap. 4 og 5 skattalógini um tilhalds- og atvinnukommunur verða nýttar sum ein treyt í býtinum.

Landsbankin
Yvirskipað tekur Landsbankin undir við ætlaðu broytingunum samstundis, sum víst verður á, at tað sum er avgerandi fyri, hvat tøkugjaldið eigur at vera, er knýtt at, hvussu stór tilfeingisrentan er.

Landssbankin hevur sæð útrokningarháttin hjá landsstýrinum og setur ikki spurning við háttin.

Fyri at tryggja gjøgnumskygni mælir Landsbankin kortini til, at landsstýrið, við støði í roknskapunum, eisini ger eina útrokning av, hvussu stór tilfeingisrentan er. Á henda hátt fæst betri yvirlit yvir, hvussu stórur partur av tilfeingisrentuni verður tikin inn við tøkugjaldinum, og hvussu stórur partur liggur eftur hjá vinnuni.

Framleiðslukostnaðurin er ein týðandi partur av útrokningargrundarlagnum at finna fram yvirnormala avkastið. Í hesum sambandinum metir Landsbankin, at tað hevði verið rímiligt, at landsstýrið setti krøv til loyvishavarar, at teir fyri teirra alibrúk á firðum lótu inn ein roknskap fyri hetta virksemi fyri seg. Allarhelst er neyðugt at áseta roknskaparreglur, hvat hesum viðvíkur, soleiðis at tað er greitt, hvat eigur at verða roknað sum framleiðslukostnaður.

Landsbankin mælir somuleiðis til at umhugsa at seta í roknskaparreglurnar, at roknskapirnir harumframt skulu vísa úrslit, har marknaðarprísir verða brúktir, um munur er á marknaðarprísi og innanhýsis avrokningarprísi. Tað er neyðugt at síggja bæði marknaðarprís og innanhýsis prísir fyri at kunna rokna rætt, hvussu stór yvirskotini eru frá alivirkseminum á sjónum.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Í viðmerkingunum verður mælt til at farið verður undir at rokna støddina á tilfeingisrentuni. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur í sambandi við lógararbeiðið gjørt útrokningar, men orsakað av óvissu um ymsar faktorar, sum Landsbankin eisini vísir á í viðmerkingum sínum, m.a. framleiðslukostnað umframt vekt og tal á smolti, tá hesi verða koyrd á sjógv, er heldur talan um metingar enn verulig tøl.

Ætlanir eru um at fara undir eina tilgongd at kanna, hvussu ymsu faktorarnir, ið eru neyðugir fyri at kunna gera av støddina á tilfeingisrentuni, kunnu fáast til høldar. Framleiðslukostnaðurin er

ein týðandi partur í hesum høpi. Samstundis kundi eisini verið greinað, hvussu eitt slíkt regluverk kundi verið skipað.

Víðvíkjandi marknaðarprísi og innanhýsis avrokningarprísi er byrjanarstøðið, at hesir eru eins, tí sambært § 37a, stk. 1, nr. 2, í skattalógini skulu skattskyldug, sum hava ræði á løgfrøðiligum persónum í sambandi við uppgerð av skattskyldugu inntøkuni nýta teir prísir og tær treytir í handilsligu ella búskaparligu viðurskiftum sínum við áðurnevndu løgfrøðiligu persónar, sum høvdu verið nýttir, um talan var um viðurskifti millum óheftar partar.

Víðari skulu skattskyldug, fevnd av § 118 a, stk. 1 í skattalógini, sambært stk. 4 *"...fáa til vega og goyma skrivligt skjalprógv, sum vísir, hvussu áseting av prísum og treytum fyri viðurskifti, sum koma undir stk. 1, er farin fram.[...] Tilfarið skal vera soleiðis háttað, at tað kann vera grundarlag undir einari meting av, um ásetingin av prísum og treytum er í samsvari við, hvat kundi verið vunnið, um viðurskiftini vóru millum óheftar partar."* Harvið er talan um tilfar, ið longu er til staðar hjá viðkomandi pørtum og tískil hevði tað ikki verið tyngjandi fyri vinnuna, um slík krøv vórðu sett viðvíkjandi innanhýsis avrokningarprísum. Av tí, at spurningurin um innanhýsis avrokningarprísir er ein liður í eini heildarmeting, fer Uttanríkis- og vinnumálaráðið ikki at gera broytingar hesum viðvíkjandi í verandi uppskoti.

Havbúnaðarfelagið
Yvirskipað mælir felagið frá, at lógin verður broytt samsvarandi verandi broytingaruppskoti.

Í hoyringarsvarinum eru fleiri tættir, men høvuðsboðskapirnir eru viðvíkjandi:

- Altjóða marknaðarprísinum
- Meirvirkaðum vørum
- Forwardprísi
- Framleiðslukostnaði
- Nýggja tøkugjaldsstiganum
- Tíðarætlanini
- Týdninginum av eini breiðari semju
- Búskapargrunni
- Gransking
- Einari skattliga grundaðari skipan

Altjóða marknaðarprísur, meirvirkaðar vørur og forwardprísir
Viðvíkjandi altjóða marknaðarprísinum vísir felagið á, at tað er skeivt einans at nýta Fish Pool Index sum grundarlag fyri altjóða laksaprísinum. Orsøkin er, at áleið 40%-50% av øllum laksi verður seldur við føstum sáttmálum, og at Uttanríkis- og vinnumálaráðið við at nýta Fish Pool Index ikki tekur atlit at, at áleið helmingurin av øllum føroyskum laksi verður víðarivirkaður áðrenn hann verður seldur av landinum. Eitt hægri tøkugjald tekur grundarlagið undan at gera sáttmálar upp á víðarivirkaðar vørur sambært felagnum, tískil verður mælt til at gera eina serskipan fyri tøkugjaldi fyri sáttmálabundnan meirvirkaðan laks.

Eisini verður víst á, at framskrivingar í uppskotinum eru bygdar á langtíðar Fish Pool forwardprísin, og at hesin ikki er egnaður at nýta sum grundarlag fyri eini rættvísandi framskriving av tøkugjaldinum, tí at forwardprísurin seinastu tvey árini hevur verið væl lægri enn tann veruligi prísurin bleiv.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Altjóða marknaðarprísir:
Tað er rætt, at spotprísirnir á Fish Pool Index ikki eru eitt til eitt sambærligir við prísgerðina fyri føroyskan laks á altjóða laksamarknaðinum. Orsøkin er, at talan er um børsprís á heilum norskum hágóðsku laksi, ið verður útfluttur til altjóða marknaðir, og tískil avspeglar hesin ikki altjóða marknaðarprísin á meirvirkaðum vørum. Hinvegin fær føroyska alivinnan, sambært søguligum hagtølum frá Kontali, í miðal munandi betri søluprís enn kappingarneytarnir og tí áttu spotprísirnir á Fish Pool Index at verið rímiliga umboðandi. Talan er samstundis um alment tilgongilig tøl, og í løtuni er onki betri grundarlag í at velja. Ein møguleiki, sum Uttanríkis- og vinnumálaráðið er sinnað at fara undir at kanna, er møguleikin við eini skrásetingarskipan, har føroysku alifyritøkurnar hava skyldu til at skráseta allar søluprísir á ávíkavíst óvirkaðum og víðarivirkaðum vørum. Á henda hátt hevði verið møguligt at fingið so sambærlig tøl fyri prísgerðina sum gjørligt, tó at aðrar avbjóðingar standast við eini slíkari skipan.

Meirvirkaðar vørur:
Viðvíkjandi framleiðslu av meirvirkaðum vørum er at viðmerkja, at framleiðsla av meirvirkaðum er ein strategi, sum er til einstaka alaran at meta um. Tað er í byrjanarstøðinum óviðkomandi fyri landið, hvat alarin ger við rávøruna, eftir at hann hevur gangnýtt framíhjárættin at ala á føroysku firðunum. Alarin skal bert víðarivirka, um tað loysir seg rakstrarbúskaparliga. Við einari tøkugjaldsskipan sum teirri føroysku, vil eitt lægri gjald til víðarivirking vera at meta sum ein stuðul til framleiðslu. Tá alarar gera av at víðarivirka ein part av rávøruni, er tað í ávísan mun eisini ein hedging strategi, har alarin prístryggjar seg móti sveiggjum í marknaðarprísum. Tað merkir, at alarin fær fyrimun av lagtíðaravtaluni, tá altjóða marknaðarprísurin er lágur og missir, tá altjóða marknaðarprísurin er høgur.

Um farið verður til eina skipan, har alifyritøkurnar hava skyldu til at fráboða søluprísir, eru hesir umboðandi og kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri altjóða marknaðarprísinum.

Fish Pool forwardprísir:
Viðvíkjandi viðmerkingini um, at forwardprísurin ikki er egnaður til at gera framskrivingar við, er at siga, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið er vitandi um, at søguliga hevur veruliga prísgerðin á spotmarknaðinum verið hægri enn forwardprísurin. Hetta sama er eisini galdandi fyri aðrar vørur, eitt nú olju. Tað er samstundis eisini orsøkin til, at framrokningar bert eru gjørdar fyri 2023 og 2024.

Framleiðslukostnaður
Felagið vísir á, at tað er alneyðugt, at ein skipan við framleiðslukostnaði verður grundað á meira dagførd tøl – serliga tá framleiðslukostnaðurin veksur so skjótt, sum hann hevur gjørt seinastu tíðina.

Víst verður á, at framleiðslukostnaður í løtuni hækkar munandi orsakað av stórum íløgum, hækkingum í fóðurprísi og íløgum í nýggja útgerð. Økt framleiðsla krevur munandi størri íløgur, bæði á landi og á sjógvi.

Havbúnaðarfelagið metir tí, at framleiðslukostnaðurin skal grundast á røtt tøl fyri framleiðslukostnaðin. Hetta kann gerast við at nýta seinasta kvartalsroknskap hjá feløgunum, og síðani kundi gjaldið verði eftirregulerað hvønn ársfjórðing.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Tað er ein sannroynd, at kostnaðarstøðið á at kalla øllum vørum er hækkað seinasta árið og tískil er væl skilligt, at alifeløgini leggja fram ynski um, at dagførd tøl verða nýtt sum grundarlag fyri útroknaða framleiðslukostnaðinum.

Landsstýrið ynskir at ganga hesum ynskinum hjá vinnuni á møti, og hevur tí tillagað uppskotið nakað, soleiðis at framleiðslukostnaðurin verður gjørdur upp hálvárliga.

Nýggi tøkugjaldsstigin
Í svarinum vísir felagið á, at tøkugjaldsstigin hevur stóra óvissu við sær við tað, at hann hækkar í stigum, har øll tøkan verður skattað fult við stigvíst hækkandi skattaprosentum. Tað inniber, at tað kann vera heilt stórur munur á støddini á tøkugjaldinum, sjálvt við heilt smáum broytingum í altjóða marknaðarprísinum. Hetta merkir, at óvissan hjá bæði alivinnuni og landinum økist og samstundis fær vinnan minni burturúr, um prísurin hækkar beint upp um næsta stig á stiganum. Sambært felagnum hevði ein linjurøtt útrokning, sum er flatari at byrja við, og er meira krøpp, tá vinningurin er stórur, verið ein betri leistur at ásett gjaldið eftir, og hevði minkað um óvissuna fyri vinnuna og fyri landið. Kortini er umráðandi, at samlaða tøkugjaldið ikki verður hægri sum avleiðing av at gera slíka broyting.

Harumframt heldur Havbúnaðarfelagið, at einki loyvisgjald eigur at verða rindað, tá undirskot er av framleiðsluni, áðrenn skatt og tøkugjald. Harvið heldur felagið, at loyvisgjaldið eigur at verða 0%, tá altjóða marknaðarprísurin er undir framleiðslukostnaðinum. Eisini verður mælt til, at loyvisgjald á 2,5% upp til framleiðslukostnað + 5 kr. verður broytt til 0,5%, so ov nógv ikki verður tikið frá vinnuni, tá laksaprísurin fellur.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Støði er tikið í verandi stiga, sum síðani er útbygdur nakað. Tað er rætt, at smávegis broytingar í altjóða marknaðarprísinum í byrjanini og endanum á hvørjum intervalli kunnu hava ta avleiðing, at tøkugjaldið ávikavist veksur ella fellur 2,5%.

Tøkugjaldið verður gjørt upp mánaðarliga, og tí er ósannlíkt, at gjaldið áhaldandi fer upp á næsta stig á stiganum.

Viðvíkjandi viðmerkingini um, at vinnan ikki skal rinda loyvisgjald, tá undirskot er av framleiðsluni, er at siga, at tað hevur verið ein grundregla frá byrjan, at alarar gjalda eitt ávíst leigugjald fyri framíhjárættin til firðirnar. Hetta er uttan mun til, hvør marknaðarprísurin er.

Í mun til at broyta lægstu stigini í stiganum, so heldur landsstýrið fast við orðingarnar í uppskotinum, ið varð sent til hoyringar.

Tíðarætlan
Felagið vísir á, at tíðarætlanin fyri hetta lógaruppskotið er ov pressað, og at gildiskoman eigur at verða útsett til 1. januar, so alifeløgini fáa betri umstøður at tillaga seg til broyttu fortreytirnar (langtíðarsáttmalar v.m.).

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Víst verður á, at tað kemur ikki óvæntað á vinnuna, at broytingar verða gjørdar í tøkugjaldslógini. Undanfarna samgonga legði uppskot um broytingar í lóg um tøkugjald fyri Tingið á heysti í 2022, men uppskotið fall burtur, tá val varð útskrivað fyri jól. Um hetta verður havt í huga, so hevur føroyska alivinnan fyrstu 7 mánaðirnar í árinum sloppið undan munandi

upphæddum í loyvisgjaldi. Sostatt hava alifeløgini havt møguleika at tillaga virksemið nakað, hóast størri partur av tilfeingisrentuni fellur til landið við hesum uppskotinum.

Skattliga grundað skipan
Havbúnaðarfelagið kundi hugsað sær, at tøkugjaldið heldur gerst ein skattlig skipan, sum leggur upp fyri fleiri viðurskiftum, t.d. at aliøkini eru ymisk og hava ymiskar útreiðslur við sær; skattaskipanin eigur ikki at forða fyri nýskapan; skipanin eigur at verða neutral við atliti at, um alarin velur at selja feskan laks á spotmarknaðinum ella meirvirkar vøruna; og ein skattlig skipan eigur eisini at vera neutral, tá ið talan er um at gera íløgur.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Sjónarmiðini hjá Havbúnaðarfelagnum eru vælkend og hava verið førd fram fleiri ferðir, tá ið broytingar í tøkugjaldinum hava verið á skránni. Í politisku skipanini hevur nú yvir fleiri landsstýrisskeið verið semja um, at vit skulu hava eina skipan, har partur av samlaða skattinum, sum alivinnan rindar, skal koma frá einum loyvisgjaldi, sum verður tikið inn í fyrsta liði. At leggja skipanina fult og heilt um til skatt av yvirskoti, letur tað í ávísan mun upp til fyritøkurnar at gera av, t.d. við íløgum og avskrivingum, hvussu nógvan skatt tær rinda.

Misnøgd við ta skipanina, sum vit høvdu við partafelags- og vinningsbýtisskatti, var ein av orsøkunum til, at vit fingu loyvisgjald (tøkugjald).

Ynskið um eina skattaskipan, sum ikki ávirkar um ein íløga verður gjørd ella ikki, er løtt at skilja. Íløgur, sum loysa seg áðrenn skatt og avgjøld, eiga eisini at loysa seg eftir skatt og avgjøld, sigur Havbúnaðarfelagið.

Men ein skattaskipan riggar sjálvsagt best, um fyritøkur gera íløgur út frá normalum avkasti, møguliga við váðapremiu, sum lánveitarar eru sinnaðir at fíggja. Verða íløgurnar lagdar til rættis út frá, at fyritøkurnar hava yvirnormalan vinning, er vandi fyri, at íløgurnar verða við til at skeikla onnur viðurskifti í samfelagnum, t.d. kostnaðarstøðið og tørvin á arbeiðsmegi.

Ein skattaskipan gevur tí samfelagsliga best meining, um landið fyrst tekur inn tilfeingisrentuna, tí yvirnormala avkastið virkar sum ein stuðul í vinnuni og kann viðføra ov stórar íløgur. Ella við øðrum orðum kunnu íløgur vera rentablar virkisbúskaparliga, men geva negativt íkast samfelagsbúskaparliga, sí hoyringarsvar frá Landsbankanum.

Landsstýrið hevur ikki ta ætlan at ganga alifyritøkum so nær, at tær ikki eisini frameftir kunnu gera munadyggar íløgur, bæði fyri at vaksa og fyri at tryggja burðardygga aling.

Um farið verður frá verandi skipan við loyvisgaldi, har rindað verður í fyrsta liði, má gerast eitt grundleggjandi arbeiði, har funnið verður fram til røttu tilfeingisrentuna og komið verður ásamt um, hvussu stóran part av henni, landið eigur at taka inn. Stundir eru ikki at gera tað í sambandi við hetta lógaruppskotið.

Breið politisk semja
Í svarinum vísir felagið á, at skatta- og avgjaldsskipanir kring alivinnuna eiga at verða grundaðar á eina breiða poltitiska semju, soleiðis at tað ber til hjá vinnuni at leggja íløguætlanir til rættis á einum nøkulunda tryggum grundarlagi. Skatta- og avgjaldsskipanin eigur at tryggja, at íløgur, sum loysa seg áðrenn skatt og avgjøld, eisini loysa seg aftaná skatt og avgjøld.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Landsstýrið ásannar stóra týdningin, ið støðugir karmar hava fyri vinnulívið, og undir hesum eisini alivinnuna. Tað er ein fortreyt, tá avgerðir skulu takast. Tað er tí sera óheppið, tá hesir

karmar verða broyttir við jøvnum millumbilum, sum tíverri alt ov ofta hevur víst seg við lóg um loyvisgjald á alivinnu. Tískil vónar landsstýrið, at tað fer at bera til at finna eina breiða politiska semju um uppskotið.

Búskapargrunnur
Í hoyringarskrivinum undrast felagið á, at tað í uppskotinum ikki verður tilskilað, at inntøkurnar frá tøkugjaldinum skulu í búskapargrunn. Víst verður í hesum sambandi á, at vandin fyri ófyrireikaðum og brádligum broytingum minkar munandi, um tøkugjaldið fer um búskapargrunn heldur enn beinleiðis á fíggjarlógina. Samstundis verður víst á, at Havbúnaðarfelagið heldur, at tað eigur ikki at vera stuttskygdi tørvurin í samband við eina fíggjarlóg, sum avger, hvat alivinnan rindar í loyvisgjaldi, og mælt verður til, at tað í viðmerkingunum verður nevnt, at inntøkurnar frá loyvisgjaldinum fara í búskapargrunnin.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Tað er framvegis ætlanin hjá landsstýrinum, at partur av inntøkunum frá tøkugjaldinum skal í búskapargrunn. Viðurskifti viðvíkjandi Búskapargrunni Føroya verða regulerað í Lóg um Búskapargrunn Føroya, og tískil eiga broytingar hesum viðvíkjandi at verða gjørdar í teirri lógini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er sinnað at nevna ætlanir landsstýrisins í viðmerkingunum til uppskotið.

Gransking
Felagið vísir á, at tað í uppskotinum ikki er ásett, hvussu stór upphædd verður sett av til gransking til frama fyri aling í Føroyum. Tað metir Havbúnaðarfelagið vera óheppið og vísir á, at tað skuldi verið greitt í lógaruppskotinum, hvussu stórur partur av loyvisgjaldinum fer til aligransking.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Ætlanin er, at 1% av inntøkunum frá tøkugjaldinum verður sett av til almenna gransking innan burðardygga alivinnu.